# Andaligur fyristøðumaður myrdur

**Ummæli av skaldsøguni *Sólstormur*, ið varð heiðrað sum ársins krimidebut í Svøríki í 2003. Nú týdd til føroyskt og útkomin á forlagnum Nýlendi.**

Åsa Larsson
SÓLSTORMUR
Nýlendi, 2006
295 síður, Krimi

*Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð*




Trúgv kann flyta fjøll, vilja summi vera við. Um hetta eisini er galdandi fyri býir, er ein annar spurningur. Ið hvussu er, eru tey heilt har norðuri í Norrbotten farin undir at flyta allan miðbýin í einum av stóru býunum, Kiruna, at hann skal ikki enda í ánni, sum rennur har. Um tað ikki eydnast teimum, er tað hvørki trúloysi ella gudloysi fyri at takka, tí fáar staðir í Svøríki – ella Evropa, fyri alt tað (Føroyar undantiknar) – eru fólk so tøld av gudsótta og heilagum anda sum í Kiruna.

Tað er úr hesum fjarskotna jørðildi, krimiskaldsøgan *Sólstormur* er sprottin. Rithøvundurin er Åsa Larsson, advokatur, og hon er sjálv født og uppvaksin í Kiruna, men býr í dag í Mariefred, nærindis Stokkhólmi. Alt hetta eiga høvuðspersónurin í skaldsøguni, Rebekka Martinsson, og rithøvundurin til felags, men Rebekka hevur tað afturat, at hon gongur við einum loyndarmáli, sum vísir seg at hava træðrir allan vegin inn í sjálvt hjartað á ódjórinum, sum so líðandi trínur fram úr óhugnaliga myrkrinum uppi í vetrarklædda og bítandi kalda Kiruna.

Søgan er í stuttum, at bróðir eina ungdómsvinkonu hjá Rebekku, Viktor Strandgård, verður myrdur. Drápið er sera rátt, og tað ger tað ikki minni tespiligt, at tað er framt í nýggju glæsiligu og stórbæru kirkjuni hjá samkomuni Kraftkelduni, har tann myrdi hevði verið andaligur fyristøðumaður. Rebekka, sum býr og arbeiðir í Stokkhólmi, fer alt fyri eitt heim til Kiruna at vera um vinkonu sína og børn hennara, og sum frá líður fær hon greiðu á, at tey eru mong, sum so ella so kunnu hava havt sína egnu orsøk til at drepa Viktor. Men áðrenn hon veit av, er hon sjálv vorðin eitt týðandi fólk í einum talvi, sum verður stýrt av fanatismu, fjaldum motivum og maktgirnd.

*Sólstormur* er ein sera spennandi krimisøga, og hon gongur fyri seg í einum umhvørvi, sum ikki er heilt ókent fyri nógvar føroyingar, nevniliga í einari kristnari samkomu í einum fjarskotnum og nokk so avbyrgdum horni av Svøríki, sum í nógvar mátar kann líknast við Føroyar. Kiruna og umráðið kring býin er og hevur eisini í søguliga veruleikanum verið sera nógv ávirkað av trúarsamfeløgum og samkomum við ógvuliga víðgongdum sjónarmiðum.

Eitt nú var har í tíðini millum fyrra og seinna heimsbardaga ein ovurstór dómadagssekt, sum hevði sett ein ávísan dag fyri, at heimurin skuldi ganga undir, við tí úrsliti, at limirnir í tíðini fram til henda dag at kalla fingu loyvi til at gera við hvønn annan sum teimum lysti. Tá so dagurin bæði kom og fór, uttan at heimurin fór nakran veg, stóðu tey eftir við moralskum timburmonnum í ólukkumát. Tað sigst, at av tí at sektin var so stór, eru flestu Kirunabúgvar enn á døgum ættaðir frá onkrum limi í hesi ólukku sekt.

Fyri okkum føroyingar eru tað sostatt viðkomandi og kendir spurningar, sum verða havdir á lofti. Men samstundis er verkevnið brotsgerð – bókmentaliga sæð rættiliga fittligt at fáast við, og tað hevur eisini verið nógv brúkt í krimisøgum áður. Spurningurin er tí, um Åsa Larsson megnar at fáa sum mest burturúr tilfarinum, hon hevur at arbeiða við. Her er svarið: ja – við einum lítlum: men. Sum krimisøga eydnast *Sólstormur* heilt væl, spenningurin verður fasthildin gjøgnum alla bókina, og endin er bæði harðligur og ódligur og hartil nokk so óvæntaður. Tað er tí ikki heilt óskiljandi, at Åsa Larsson fyri *Sólstorm* fekk "Svenska Deckarakademins pris för bästa krimidebut" 2003.

Aðramáta er *Sólstormur* ein krimisøga við stórum K, har søguflætta, spenningsrás og sannroyndir hava alt at siga, meðan lýsingar av persónum, umhvørvi og samfelag koma í aðru røð. Hetta ger, at høvuðspersónurin, Rebekka Martinsson, í besta detektivsøgustíli, framvegis er líka gátufør og løgin, tá ið bókin endar, sum tá ið hon byrjaði. Sum heild er tað í lagi við tí, men sumstaðni verður skrivað óneyðuga nógv um ymiskt, sum hevur lítlan týdning fyri søgugongdina, og sum at kalla tvingar lesaran út á villinistíggj. Tað er kanska ætlanin, men kundi verið gjørt snildari.

Tað er forlagið Nýlendi, sum gav bókina út, og hon er sum heild væl týdd av Jákupi í Skemmuni. Bókin er ein fikkubók, sum liggur væl í hondini. Eitt minus eru kortini stavirnir, serstakliga skákstavirnir, sum eru dekan og smáir.

*Sólstormur* er fyrsta krimiskaldsøgan hjá Åsu Larsson, sum er týdd til føroyskt. Í Svøríki eru nú komnar tvær afturat, við Rebekku Martinsson í høvuðsleiklutinum, *Det blod som spillts* (2004) og *Svart stig* (2006). Vónandi koma tær eisini skjótt á føroyskum, soleiðis at føroyskir lesarar ikki skulu ótolnast alt ov leingi eftir at hava lisið *Sólstorm*.

## VIKUSKIFTI

### Úr blaðnum hetta vikuskiftið




Meðan vit stríðast við trongskygdan kristindóm, fundamentalismu og aðra óhumsku, buldrar alheimsgerðin avstað. Vit liva framvegis í okkara egna afturútsiglda, avbyrgda og lítla heimi.

Útsýnið má víðkast! Og tíbetur eru vit spakuliga farin at hóma heimin uttanfyri. Men hvørja ferð grett verður um broyting, spríkir angistarsveittin og døggar fyri útsýninum. Tað metir Carl Johan Jensen, rithøvundur. Lesið fimta part í greinarøð um átrúnað og modernaða menniskjað í Vikuskiftinum í morgin

### »MÍN MEINING«




Í nýggja teignum »MÍN MEINING« fer Pauli Ellefsen, fyrrverandi løgmaður framyvir at siga sína hjartans meining um ymisk samfelagsviðurskifti. Hesaferð er tað um fólkaskúlan. Tað undrar ikki Paula, at tað gekk sum tað gekk við PISA kanningini. Hann vísir á, at tað var í óðum verki, at fólkaskúlin varð yvirtikin seinast í sjeytiárunum. - Hetta var gjørt púra ófyrireikað - og grundgevingarnar vóru, at vit skuldu sleppa av við »danska samleikan«, sigur hann. Kortini eru undanførslurnar í dag tær somu, at okkum tørvar ein føroyskan samleika, sigur Pauli. - Hevur nakar loyvi at ivast í, at vit føroyingar hava okkara egna serstaka samleika sum ikki ber á brá av at minna um nakað annað fólk í heiminum? Í hvussu so er ikki fyrr enn vit hava smoygt ein mexicanarahatt niður um oyrini á okkara løgtings- og landsstýrislimum, heldur Pauli Ellefsen.

### Ein túrur í gomlu Havnini




Finnur Johansen í Havn hevur givið út áhugaverda bók við gomlum Havnarmyndum frá 1860-1900. Vit blaða í bókini…